# Forkunnug Valentines heilsan úr Rotterdam



*Annika Jacobsen og børnini Edvard og Súnhild síggjast her við ballónini, sum tey funnu leygardagin*

**Leygardagin funnu Annika Jacobsen og børnini Súnhild og Edvard eina forkunnuga ballón í Søltuvík. Ballónin er úr Rotterdam og var ætlað sum ein Valentines heilsan frá næmingunum fróðskaparsetrinum í býnum. Ballónin og heilsanin hava vunnið seg heilt til Føroya**

VALENTINES HEILSAN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Ja eg eri sannførd um, at ballónin kemur heilt úr Hollandi, sigur Annika Jacobsen, tá hon verður spurd um hon er vís í, at ballónin hon og børnini funnu seinasta leygardag er komin heilt úr Hollandi.

Seinasta vikuskifti vitjaðu Annika og børnini familju á Sandoynni. Leygardagin varð skipað fyri gongutúri í Søltuvík og á gongutúrinum komu tey á eina grøna ballón, sum var stødd millum tveir steinar.

Annika og børnini velja at kanna nærri, hvat hetta er fyri ein ballón og koma fram á, at á ballónini stendur skrivað heimasíðan www. citycollege.nl á .

### Valentines heilsan

Júst heimkomin fer Annika at kanna heimasíðuna, sum stendur skrivað á ballónini og varnast, at talan er um fróðskaparsetrið í Rotterdam í Hollandi. Á sjálvari heimasíðuni stendur skrivað, at 14. februar hava næmingarnar á skúlanum sent Valentines heilsanir, sum vóru festar fastar í ballónir, upp í himmalin.

Ballónin, sum Annika og børnini funnu leygardagin var júst av sama slagið, sum næmingarnir hava sent upp í himmalin 14 februar. Ballónin er eisini grøn og sami tekstur er skrivaður, umframt at ein Valentines heilsan var fest føst á ballónina, sum varð funnin leygardagin

Tískil bendir nógv á, at ein av Valentines heilsaninum frá næmingunum á fróðskapasetrinum í Rotterdam hevur vunnið seg heilt til Søltuvíkar.



*Her sæst ein næmingur á fróðskaparsetrinum í Rotterdam við Valentines heilsaninum, sum vóru sendar upp 14. februar*

# Trygd fegnast um framgongd

**Roknaskaparúrslitið hjá Tryggingarfelagnum, Trygd, fyri 2003 var 1,9 mio. í yvirskoti. Eginpeningurin hjál felagnum er nú 116 mió. krónur**

ROKNSKAPUR
*Pàll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í seinastu viku samtykti nevndin hjá tryggingarfelagnum, Trygd, roknskapin fyri 2003. Ársúrslitið fyri 2003 var 1,9 mio. í yvirskoti eftir skatt. Eginpeningurin hjá P/F Trygd fevndi við árslok 2003 um 116 mió. krónur Nevndin í P/F Trygd ásannar, at kappingin á tryggingarmarknaðinum er hørð, men fegnast kortini um vøksturin á tryggingarøkinum. Tryggingargjøldini eru brutto økt úr 41,4 mio. krónum í 2002 til 50, 3 mió. krónum í 2003. Henda øking svarar til góð 21 %

### Stórir brunaskaðar

Í fjør vóru fleiri stórir brunaskaðar, ið tyngdu brunatryggingina hjá P/F Trygd. Nevndin felagnum er ikki heilt nøgd við gongdina innan brunatrygging og sjóvátrygging. Tryggingartekniksa økið, sum millum annað fevnir um brunatrygging og sjóvátrygging, gav eitt hall á 0,6 mio. krónur í fjør.

# Nógv vilja fram í ljósið

**Sera stórur áhugi er fyri listaframsýningini, Fram í Ljósið, sum Norðoya Sparikassi skipar fyri**

LIST
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

**Klaksvík:**
Eini 60 fólk hava teknað seg til listaframsýningina Fram í Ljósið, sum letur upp á Grækarismessu tann 12. mars.

Norðoya Sparikassi skipar fyri framsýningini, og má undirtøkan sigast at vera sera góð. Hetta er stjórin í Norðoya Sparikassa Eyðfinn Reyðberg bilsin av. Hann sigur, at hann var skeptiskur, tá hugskotið um hesa framsýningina kom á borðið, men hann viðgongur nú, at hetta var eitt frálíkt hugskot.

– Fólk hava steðgað og takkað mær fyri, at vit skipa fyri hesari framsýningini fleiri ferðir. Og tað er eisini fólk, sum eg vanliga ikki tosi so nógv við, sigur Eyðfinn, sum heldur, at tað sigur nógv, at 60 fólk hava teknað seg.

### Breiddin

Eyðfinn heldur, at so mong ókend og minni kend listafólk fara at geva framsýningini eina ávísa breidd, sum verður áhugaverd.

Eisini sigur hann, at hetta hóskar væl saman við øðrum, sum sparikassin hevur lagt seg eftir at stuðla. Her hugsar hann serliga um tónleikin og ítróttin.

Peningastovnurin hevur ein tónleikagrunn, sum veitir tónleikarum stuðul. Umleið 150.000 krónur fara úr grunninum um árið, og fara teir til millum fimm og sjey fólk.

Í ítróttinum stuðlar sparikassin nógv yngru deildunum, og við hesum saman við listini og tónleikinum, heldur Eyðfinn, at breiddin er tilstaðar og eitt gott grundarlag fyri at røkka út. Hann vísir sum dømi á, at við 60 fólkum til eina listaframsýning, er breiddin har. Í tí breiddini eru kanska eini fimm, sum eru framúr góð.

– Tað er ikki vist, at hesi nakrantíð høvdu komið fram, tí tey kanska ikki hava tað í sær at traðka fram av sær sjálvum, tí er hendan listaframsýningin so uppløgd, sigur Eyðfinn. Sparikassin royndarkoyrir nú hesa framsýningina, sum letur upp í Skálanum tann 12.mars.

– So fáa vit at síggja, hvussu tað gongur, og eydnast hon væl, so er tað so upplagt, at onnur áhugaði traðka til og taka yvir við stuðuli frá okkum, sigur Eyðfinn.

Framsýningin letur sum sagt upp á Grækarismessu, og verður hon í Skálanum.



*Seksti ókend og minni kend listafólk hava teknað seg til listaframsýningina Fram í Ljósið, sum Norðoya Sparikassi skipar fyri*



# Barnavognur ikki vandamikil kortini



*Simo Kombivognurin er kortini ikki so vandamikil, sum Trygdarstýrið undir danska vinnumálaráðnum vildi vera við eftir nakrar trygdarroyndir, sum vognurin hevði verið ígjøgnum*

**Herfyri sendi Trygdarstýrið undir danska vinnumálaráðnum út eitt skriv, har sjey barnavognar vóru sagdir at vera lívshættisligir. Men nú hevur Trygdarstýrið viðurkent, at ein av hesum, tað er Simo Kombivognurin, als ikki átti at verðið tikin av marknaðinum**

BARNAVOGNAR
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

– Trygdarstýrið hevur nú ásannað, at tað skuldi ikki verðið sett eitt bann fyri at Simo Kombivognurin Supreme kann seljast.

Hetta sigur european nursery group í einum brævi til síni umboð í Føroyum. Eitt teirra er handilin Ciconia í Klaksvík, sum Mariann Fuglø eigur. Seinast vit frættu frá henni, bíðaði hon eftir boðum frá teimum, um hvat fór at henda víðari í málinum.

Tá hevið ENG boðað frá, at tey fóru at kæra avgerðina hjá Trygdarstýrinum viðvíkjandi Simo Kombivogninum.

Síðani tað kom fram, at vognurin skuldi vera vandamikil, hava nøkur fólk vent sær til handilin, sum hava keypt ein tílíkan vogn innan fyri tað seinasta árið.

Mariann sigur nú, at hon hevur fingið hetta skrivið frá ENG fyri einari góðari viku síðani, og at nú er alt tikið aftur.

Trygdarstýrið krevur tó, at ein skrúva verður sett á handtaksreguleringina, so at hon ikki kann leggjast heilt niður, tí hetta var tað, sum Trygdarstýrið metti at vera mest vandamikið við vogninum.

Sostatt vil tað siga, at Trygdarstýrið hevur viðurkent, at Simo Kombi-vognurin als ikki er so vandamikil, sum ført varð fram av fyrstan tíð.

### Fakta

Listin frá Trygdarstýrinum yvir vandamiklu barnavognarnar sá soleiðis út:

Ikki álvarsamir, men fáir týðandi feilir:
* Teutonia Delta, Kombi
* Bugaboo Frog, Duo
* Emmaljunga Classic, Duo
* Brio Kombi, Kombi
* Peg-Pérego Giovane, Duo

Teir sjey vognarnir, sum skulu av marknaðinum:
* Ora Fondeo, Duo
* Ora Urban, Kombi
* Jysk Amalie, Barne
* Trixx, Duo
* Simo Kombi Supreme, Kombi
* Carena X-line, Duo
* Carena Malu, Kombi

Komdi er ein klappvognur, sum eisini kann vera barnavognur, tá ein lyft verður sett í hann. Duo er eitt stell, har annaðhvørt ein barnavognakassi ella klappvognasetur verður monterað.

Barne – er ein klassiskur barnavognur




6. - 17. august 2004 www.listastevnan.com



jethro tull - heimskendi rockbólkurin á vitjan

Víðagitnu Jethro Tull koma til Føroya. Eftir at hava givið út 40 tónlistaútgávur, selt yvir 60 milliónir plátur og fløgur, eru teir enn ikki settir í bás. Teir spenna úr blues, folk rock, prog rock, einum farra av jazzi, til eysturlendskar tónar. Kom og uppliv teir live á Listastevnu Føroya. Ein konsert – ein møguleiki.
Sámal Ravnsfjall og Ronnie Nielsen byrja konsertina.

Mikukvøldið 11.08.04.
Kl. 20.00

Norðurlandahúsið
Húsið letur upp kl. 19.00

Atgongumerkjasølan byrjar í Norðurlandahúsinum mánadagin 1. mars kl. 09.00.
Sitipláss kr. 375,- Standipláss kr. 275,-

team85 tel 358000

listastevna føroya art festival
NORÐURLANDAHÚSIÐ Í FØROYUM 2004